


# FARMAKONOMNÆMINGUR Á TJALDURS APOTEK

**Útbúgvingin í stuttum:**

At læra um heilsu, heilivág og viðgerð við heilivági, hvørji evni eru í heilivágstilbúningum, hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.

At arbeiða sjálvstøðugt og í toymum og taka avgerðir eftir galdandi lógum og kunngerðum.

At geva kundum okkara góða tænastu og leiðbeina í sambandi við útflýggjan av apoteksvørum.

**Hvussu:**

Útbúgvingin tekur 3 ár og skiftir ímillum arbeiði á apotekinum og skeið á Farmakonomskúlanum.

Næmingalønin er góð:0)

Útbúgvingin er í samstarvi við Farmakonomskúlan Pharmakon í Hillerød - Danmark.

Les meira um útbúgvingina á www.pharmakon.dk og www.apotek.fo

**Krøv til umsøkjaran:**

Opið sinni og hug at arbeiða við fólki er eitt 'MUST'.

Students-, HF-, HH-, HT- ella Fiskivinnuskúlaprógv.

Umsøknin skal sendast:
Tjaldurs Apotek
Postboks 3010
100 Tórshavn
tlf.341100
Kontaktpersónur:
Elisabeth Joensen-Næs
Umsóknarfreist: 12. apríl 2010

**WWW.APOTEK.FO**

# SERSTØK BYGGISAMTYKT

## Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið til nýggja kirkju á Argjum

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 18. mars 2010 hevur samtykt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið til nýggja kirkju á Argjum.

Serstaka byggisamtyktin snýr seg um at skipa eitt øki uppá uml. 4.000 $m^2$ til at byggja nýggja kirkju á Argjum. Økið liggur í D1-øki og er partar av matr. nr. 115 og 56a, millum Støðlagøtu og Sandá, omanfyri Spinnaríið á Argjum.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu serstøku byggisamtyktina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá 29. mars til og við 19. apríl 2010, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 10. mai 2010.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# SKRIVSTOVUFÓLK / LÆRLINGUR

**Vit sóknast eftir skrivstovufólki ella lærlingi til skrivstovu okkara í Vatnsoyrum**

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Umsókn:**
- umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera okkum í hendi innan 31. mars

**Løn:**
- løn sambært avtalu

**Vit vænta av tær:**
- at tú vísir ágrýtni og nærlagni
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

Meira fæst at vita við at venda sær til Jóhan á 33 21 77, 22 11 20 ella á post@hdygd.fo

HDYGD

í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

*HDYGD er størsti vindeyga- og hurðaframleiðari í Føroyum og leggur altíð dent á at veita bestu dygd og tænastu. Í løtuni starvast 31 fólk hjá HDYGD.*

SENDISTOVAN



Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo